FILMSTEIGURIN

# Ocean's Eleven

Tá tann eleganti con-man, Danny Ocean, (George Clooney) verður latin leysur úr fangatippi, er hann til reiðar við nýggjari ætlan um eitt rán, sum fær øll onnur rán at blikna. Málið? Trý av mest populeru kasinoum í Las Vegas: The BNellagio, The Mirage og MGM Grand.

60 metrar undir glitrandi neonljósinum á Vegas Strip liggur tann ultra avanseraða vatn-, brand- og tjóvarítrygga boksin, sum inniheldur so ómetaliga nógvar pengar, sum dagliga eru í umferð í kasinounum. .Ánari er tann ísakaldi og náðileysi byggiharrin, Terry Benedict (Andy Garcia), sum ikki bakkar fyri nøkrum og sum fær tað, hann ynskir sær – líkamikið um talan er um hotell ella gentur. M. a. hevur Benedict tikið yvir eitt hotell frá Reuben Tishkoff (Elliott Gould), sum júst av somu orsøk er vorðin fíggjarligi bakmaður hansara.





Higartil er eingin sloppin væl frá einum samanbresti við Benedict, men tað hevur Ocean í sinni at broyta…

Ætlani krevur eitt serútvalt lið av bestu fakfólkum, har Ocean sum tann fyrsta setir seg í samband við Rusty Ryan (Bradd Pitt), sum skla vera maðurin við kalda yvirblikkinum. Restin, sum verður savna saman til eina innleiðandi briefing hjá Tishkoff, eu Linus Caldwell (Matt Damon), ein begávaður ungur maður við sera skjótum fingrum – ofta í fremmandum lummum, Basher Tarr (Don Cheadle), bretskur spreingievnaserfrøðingur, brøðurnir Virgil (Casey Affleck) og Turk (Scott Caan) Malloy, sum hevur fleiri ymsar uppgávur, Frank Catton (Bernie Mac), sum er professionellur spælari og observatørur á liðnum, Saul Bloom (Carl Reiner), ein elegantur, pensioneraður con-man, Livingston Dell (Eddie Jemison), sum er elektronikk- og eftiransingarserfrøðingur á liðnum, og ikki minst – tann kinverski akrobaturin, Yen (Shaobo Qin) – sum hevur eina av mest kom-primeraðu uppgávunum á liðnum…





Frumsýning

Fríggjadagin 15.02. kl. $21^{00}$ Fríggjadagin 15.02. kl. $23^{30}$
Leygardagin 16.02. kl. $21^{00}$ Leygardagin 16.02. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 17.02. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 17.02. kl. $22^{30}$

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

☆ BIO KIOSKIN ☆
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

HAVNAR BIO
☆ Tlf. 31 19 56 ☆




Billettprísur: 45,- kr.

Fríggjadagin 15.02. kl. $16^{30}$ Fríggjadagin 15.02. kl. $18^{45}$
Leygardagin 16.02. kl. $16^{30}$ Leygardagin 16.02. kl. $18^{45}$
Sunnudagin 17.02. kl. $15^{30}$ Sunnudagin 17.02. kl. $17^{45}$




Fríggjadagin 15.02. kl. $18^{00}$ Fríggjadagin 15.02. kl. $23^{00}$
Leygardagin 16.02. kl. $18^{00}$ Leygardagin 16.02. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 17.02. kl. $17^{00}$ Sunnudagin 17.02. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 15.02. kl. $20^{15}$ Leygardagin 16.02. kl. $20^{15}$
Sunnudagin 17.02. kl. $19^{15}$

KOMANDI FILMAR




Frumsýning Fríggjadagin 22.02.




Frumsýning Fríggjadagin 22.02.




# Misjavnar vikur á Eiði



FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

*Í síðstu viku var turt gólv á Norðís Seafood á Eiði, men hesa vikuna hava tey aftur verið til arbeiðis, og útlitini fyri komandi viku eru góð*

Á Norðís Seafood á Eiði var turt gólv í síðstu viku, men hesa vikuna hevur aftur verið nóg mikið av ráfiski inni, og útlitini fyri komandi viku eru góð.

Petur Mohr, virkisleiðari, sigur, at óstøðuga veðurlagið, sum var herfyri, gjørdi, at fleiri virkir lógu at kalla í fiskaloysi í eina tíð eftir.- Men nú er aftur fiskur á marknaðinum, og sum skilst, hava flestu virkir vælat gera.

Virkini, sum samstarva við Norðís Seafood um eitt nú keyp av fiski, eru Vestís í Sørvági og Sammut í Klaksvík.

- Í Sørvági og í Klaksvík, har virkini virka saltfisk, var heldur frægari við ráfiski í síðstu viku, tí teir dagar, tá ið tað viðraði, kom væl av útróðrarfiski uppá land, sigur hann.

Norðís Seafood keypir meginpartin av ráfiskinum um uppboðssøluna.

## Toskurin bíligari

Sum nevnt í aðrari grein, er toskurin fallin nakað í prísi í seinastuni, men eingin vil líka sum viðganga, hví so er.

Vit spurdu Petur Mohr, um lækkaði saltfiskaprísurin er orsøkin til fallið í toskaprísinum, men tað hevði hann einki beinleiðis boð uppá.

- Tað er rætt, at prísurin á toski er fallin nakrar krónur í seinastuni, sigur hann.

# Tríggir trolarar landað á Tvøroyri

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hósmorgunin var djúpvatnstrolarin, Phoenix á Tvøroyri við 2.000 kassum, sum Fiskavirking á Tvøroyri keypti.

Á Tvøroyri siga tey, at veiðan hjá Proenix var blandað; upsi, hýsa, svartkalvi og onnur fiskasløg.

## Suðringur og Rankin

Tveir aðrir djúpvatnstrolarar, Suðringur og Rankin, hava eisini lagt veiðina upp til Fiskavirking á Tvøroyri hesa vikuna. Suðringur var inni við 2.000 kassum og Rankin við 1700 kassum. Veiðan hjá hesum báðum trolarunum býtti seg á nøkunlunda sama hátt sum hjá Phoenix.

Á Fiskavikring á Tvøroyri hava tey ivaleyst at takast við um dagarnar.



*Djúpvatnstrolararnir, Phoenix, Suðringur og Rankin, hava landað á Tvøroyri hesa vikuna*


Nú kanst tú søkja um

**Stuðul til gransking**

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2002 er peningur játtaður til granskingarverkætlanir. Granskingarráð Føroya kann eftir umsókn veita granskingarfígging av hesi játtan.

Stuðul kann verða latin:
- føroyskum granskarum og granskaralesandi,
- gransking á ella í tilknýti til føroyskar granskingarstovnar og vinnufyritøkur
- gransking, ið verður mett at hava týdning í føroyskum høpi.

Stuðul kann latast til ymisk sløg av verkætlanum:
- smærri verkætlanir við stytri tíðarætlan,
- post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár og
- ph.d.-verkætlanir.

Fígging kann bæði latast einstøkum granskarum, samstarvsætlanum millum fleiri granskarar og samstarvsætlanum millum granskarar, granskingarumhvørvi og vinnuna. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari fær stuðul aðrastaðni eisini.

Umsóknir skula skrivast á serligt oyðublað, ið fæst á skrivstovu ráðsins og á heimasíðuni www.gransking.fo

Skrivlig vegleiðing fæst á somu støðum.

Umsóknarfreist er:
11. mars 2002, kl. 12.00

Granskingarráð Føroya
J.C. Svabos gøtu 14
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn
tlf. 315302
teldupostur: annikas@setur.fo

Gransking er gjølligar kanningar av ávísum evni til at økja vitanina um tað. 'Granskingar- og menningarvirksemi' (G&M) er skapandi arbeiði á skipaðum grundarlagi, sum hevur til endamáls at økja vísindaliga og tøkniliga kunnleikan; ella at brúka kunnleika, sum longu er til, og vísa á nýggja, praktiska nýtslu. Hugtakið 'granskingar- og menningarvirksemi' umfatar grundgransking, nýtta gransking og menningararbeiði.

- Grundgransking brýtur upp úr nýggjum, ger royndir ella er teoretiskt, ástøðiligt arbeiði, sum fyrst av øllum hevur til endamáls at fáa nýggja vitan og fatan til vegar uttan at hava ávísa nýtlsu í hýggju.
- Nýtt gransking fær somuleiðis nýggja vitan og fatan til vega, men nýtt gransking miðar fyrst av øllum ímóti at fremja ávís praktisk mál.
- Menningararbeiði er skipað arbeiði, sum er grundað á kunnleika, sum er fingin til vegar gjøgnum gransking og/ella praktiskar royndir við tí fyri eyga at skapa nýtt ella munandi bøtt tilfar, nýggjar og betri vørur, tilgongdir, skipanir ella tænastur.

OECD-definitiónir, her tó eftir: Forskningsaktiviteter på Færøerne og Grønland. Forskningssamarbejde i Vestnorden I, Tema 1997:610, Nordisk Ministerråd, bls. 43, nota 5.

SANSIR TEL 355 355

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · J.C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 53 02 · Fax 31 89 29 · annikas@setur.fo